## *Skipaeftirlitið:*

# Nøgdsemis-kanningin

Skipaeftirlitið og Fiskimannafelagið hava í felag gjørt eina nøgdsemiskanning millum føroyskar fiskimenn.

Kanningin vísir m.a., at fiskimenn ikki eru nøgdir við bjargingarvenjingar umborð og landgongd- og atkomuviðurskiftini.

Grafarnir vísa úrslitið frá samlaðu kanningini, tvs. fyri allar skipabólkar. Men kanningin er skipað so, at innlit eisini fæst í hesi viðurskifti hjá ymsu skipabólkunum.

Meginparturin av kanningini er skipaður sum ein GAP analysa. Tvs. at spurt verður um, hvussu fiskimaðurin er nøgdur við ávís viðurskifti og um hvussu týðandi hesi viðurskifti eru fyri fiskimannin.

Umleið 1100 spurnarbløð vóru send út og 227 spurnarbløð eru komin inn aftur.

Kanningin var løgd fram í Miðlahúsinum týsdagin 10. mars 2009 og er annars tøk á heimasíðuni, www.fma.fo

Kunning um hesi viðurskifti er sera týðani og økir um tilvitanina millum sjófólk og avvarandi.

Skipaeftirlitið fer undir átak í heyst at kanna bjargingarútgerð og atkomuviðurskifti umborð á skipum.

Skipaeftirlitið
Faroese Maritime Authority


Skipaeftirlitið

**Nøgdsemiskanning - fiskimenn 2008**

| | Tín meting | Hvussu týðandi er hetta fyri teg |
|---|---|---|
| | Alt ikki sømd/ur, Minni sømd/ur, Sømd/ur, Meira sømdur, Heilt sømd/ur | Als ongan týdning, Minni týðandi, Týðandi, Meiri týðandi, Sera stóran týdning |
| 1 Vit gera regluliga **bjargingarvenjingar** umborð | | |
| 2 **Bjargingarútgerðin** verður eftirhugd/viðlíkahildin regluliga | | |
| 3 **Landgongin/atkomuviðurskifti** verða brúkt og eru í góðum standi | | |
| 4 **Støðan/standurin** á arbeiðsøkjum umborð er góður | | |
| 5 **Støðan/standurin** á skipinum/bátinum sum heild er góður | | |
| 6 Eg kann **samskifta(málfarliga)** við alla manningina | | |
| 7 Skipið er útgjørt við **trygdaríætlan**, sum skal brúkast til manningin arbeiðir á dekkinum | | |
| 8 **Maskinurin** | | |
| 9 **Reinføri** | | |
| 10 **Hullinføri** er nøktandi | | |
| 11 **Kosturin/maturin** umborð er (heilsu)góður | | |

| | Ja | Nei |
|---|---|---|
| 12 Verður nýggj manning kunnað um **trygdarskipanir** áðrenn skipið siglir? | | |
| 13 Hevur tú galdandi **trygdarcertifikat**? | | |
| 14 Hevur tú galdandi **heilsuprógv(bláu bók)**? | | |
| 15 Ert tú greiður yvir hvar **tín bjargingarvestur** er? | | |

16 Um svarað er nei í spurningi **12 - 15** vinarliga greið frá hví

17 Hevur tú aðrar viðmerkingar?

18 **Eg sigli við:**
Útróðrarbáti, Línuskipi, Trolara, Flakatrolara, Nótaskipi, Farmaskipi, Ferðafólkaskipi, Øðrum

Skipaeftirlitið, box 26, FO-375 Miðvágur. Tel. 355600 Fax 355601 heimasíða: www.fma.fo - email: fma@fma.fo



# Gjøld fyri sjóvinnubrøv

**Í samband við kunngerð um gjøld fyri útgávu og endurnýggjan av sjóvinnubrøvum og viðurkenningarprógvum.**

**Hin 1. januar 2009 kom nýggj kunngerð í gildi, har gjald er ásett fyri útgávu og endurnýggjan av sjóvinnubrøvum og viðurkenningarprógvum. Hendan kunngerðin er galdandi fyri umsóknir móttiknar aftaná 1. januar 2009.**

**Gjaldið fyri sjóvinnubrøv og endurnýggingar er ásett til 250 kr. og fyri viðurkenningarprógv 500 kr.**

**Tað eru tó nøkur vinnubrøv, ið ikki skulu gjaldast fyri. Tey eru radioprógv, tangaskipaprógv og uppstiging av vinnubrævi, uttan so er, at tað er í samband við endurnýggjan.**

**Vinnubræv verður ikki útskrivað, fyrr enn tað er goldið. Verður umsókn send Skipaeftirlitinum við posti, skal kvittan fyri gjaldið liggja við.**

***Miðvágur, hin 16. desember 2008***
**Skipaeftirlitið**

# Fráboðan frá Skipaeftirlitinum

**- nr. 1/2009 um loðs- og rýmingarleytarar**

**1. mars 2009 kom í gildi ein nýggj fráboðan sum útgreinar og ásetur ískoytiskrøv til ásetingarnar í Fráboðan frá Skipaeftirlitinum B, D og E um framleiðslu, nýtslu, brúk, goymslu og eftirlit av loðs- og rýmingarleytarum.**

**Fráboðanin ásetur, at øll skip, har fjarstøðan frá havyvirflatuni til staðið á lúnningini har loðsur trygt kann koma sær innanborða, er meira enn 1,5 metrar men minni enn 9 metrar, skulu hava loðsleytara umborð.**

**Øll skip skulu haraumframt eisini hava rýmingarleytarar (indskibningslejder) samsvarandi ásetingunum í Fráboðan frá Skipaeftirlitinum B, D og E.**

**Umframt at loðsleytarin er kravdur sambært lóggávuni um trygd á sjónum, skal loðsleytarin eisini vera tøkur til nýtslu hjá Fiskiveiðieftirlitinum sambært løgtingslógini um vinnuligan fiskiskap.**

**Sum nakað nýtt, kunnu loðsleytarar nú eisini verða framleiddir úr øðrum tilfari enn ”manila”, um teir lúka framleiðslukrøvini í DS/ISO 799 standardinum og IMO resolutión A.889(21).**

**Lesið fráboðanina á heimasíðuni hjá Skipaeftirlitinum www.fma.fo - Regluportalurin**

***Skipaeftirlitið, apríl 2009***